# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SLEPPIÐ EINARI GRIND ÚTAFTUR

Vit hava sagt tað fyrr, og vit kunnu endurtaka tað, at grindadrápið, sum vit hava kent tað í øldir, helst er á veg í søguna. Men tað er ikki endilga tí, at tað skal enda so. Men soleiðis sum vit hátta okkum – bæði yvir fyri egnum læknaligum myndugleikum, móti útlendingum, sum ikki duga at skilja hesa mentan okkara – og ikki minst móti okkara egnu vísindafólkum, so skapa vit fortreytirnar soleiðis, at tað helst ikki kann enda við øðrum enn, at grindadrápið fer í søguna.

Tað nyttar einki, at vit siga, at soleiðis hava vit gjørt í túsund ár, tí um vit ikki kunnu leggja prógv á borðið um, at veiðan er burðardygg, so kann alt gera tað sama. Og tað nyttar ikki at gera sum í fiskivinnuni, at grindamenn vita best, tí tað gera teir als ikki. Eingin veit, hvussu stórur stovnurin er, og tí er tað av størsta týdningi, at hann verður kannaður.

Bjarni Mikkelsen, sum er lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum sigur í blaðnum í dag, at tey hava verið klár í 11 ár við sendarum at seta á eina grind, fyri at kunna kanna, hvussu grindin ferðast. Men tey sleppa ikki. Sýslumenn og grindamenn vilja ikki lata náttúrugripasavni fáa eina heila grind at merkja, fyri síðani at sleppa øllum hvalunum útaftur. Atlitið fyri lakaíløtunum og grýtunum er størri, enn fyri at veita vísindunum ta hjálp, sum kundi bjargað okkum hendan partin av mentanini, so grindadrápið ikki fór í søguna, tí at onnur halda okkum veiða hótt djóraslag.

Men hetta er kanska føroyska samfelagið í einum nøtuhylki: Eingin skal koma her og siga okkum, hvar skápið skal standa. Tað vita vit best sjálvir...

Og Bjarni Mikkelsen hevur eitt gott poeng, táhann sigur, at við at gera meira burtur úr at granska grind, so kann tað vera ein góður trumfur mótvegis umhvørvisfelagsskapum. Á tann hátt kunnu vit vísa teimum, at vit ikki



bara drepa grind, men at vit eisini granska í grindini.

Tað kann so bara gagna okkum, at vit taka slík stig, sum gevur okkum vælvild úti í heimi. Ikki minst nú, tá fleiri umhvørvisfelagsskapir hava boðað frá, at teir ætla sær higar í summar. Og teir høvdu heilt víst tikið tað eitt sindur róligari, um tey tíðindi nú bórust, at føroyingar hava slept eini heilari grind útaftur – við sendarum – til granskingarendamál.

Eitt er víst, eingin fer at granska grindina fyri okkum. Gera vit tað ikki sjálv, so verður tað ikki gjørt. Og verður tað ikki gjørt, so verður tað orsøkin til, at grindadrápið um fá ár fer í søguna.

**Eingin fer at granska grindina fyri okkum**



## Ævintýrmyndir hjá Janusi

Ein sera forkunnug tónleikaævintýrabók er komin út. Tað er sum Rakel Helmsdal, sum hevur skrivað, Janus á Húsagarði hevur teknað og Bjarni Bæk hevur gjørt tónleikin. Sunnudagin klokkan 15 letur upp framsýning í Norðurlandahúsinum, har tær 19 myndirnar hjá Janusi eru til sølu. Klokkan 16 fer Føroya Symfoniorekstur at hava aðalroynd, og tá ber til hjá teimumvitjandi at hoyra tónleikin. Lesið annars grein um evnið á síðu 31.

## Minniluta diktaturið hoknaði



At tað ber til at finna politiskar loysnir uttan at hava eina meirilutasamgongu, tað hava vit sæð nøkur dømi um.

Sambandsflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum seinasta mansaldurin ikki hava torað at gjørt ímóti vilja Fólkafloksins á fiskivinnuøkinum, eru nú so sera samdir í makrelmálinum, at ein nýggja samgonga longu er at hóma.

Somuleiðis sóðu vit í gjár, at tað er sera smart at fáa eldfim mál samtykt í tinginum - júst tá eingin samgongumeiriluti er! Vit hava jú havt minnilutadiktatur í so nógvum málum. Ikki bara í rúsdrekkamálum, men í fleiri sokallaðum »etiskum málum«, hvat tað so enn merkir. Tí er politikkur ikki etikkur? Ella er politikkur óetiskur? Jú, kanska...

Men »hvorom alting er«, so megnaði ein meiriluti av løgtinginum at samtykkja uppskotið hjá Bjørt Samuelsen, Kára á Rógvi og Magna Laksáfoss eina og aleina tí, at minnilutadiktaturið ikki virkaði, tí eingin samgonga var at seta í veð!

Fleiri av teimum, sum vilja hava blokerandi minnilutaveldi, royndu at trýsta – og elvdu teimum »ræstrúgvandi« í samgonguni um at trýsta. Men einki bagdi. Minnilutadiktaturið er fallið við staðfestingini minnilutasamgonguni hjá Kaj Leo og Aksel. Smart hjá summum – og keðiligt hjá summum...



**Psykiatrisk hjálp**

HERI MOHR
KJAK Á SÍÐU 21



**Kringvarpið spælir við eld**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 21

Mynd: Jens Kristian Vang



*Løgreglan roynir at fáa ferðsluna at ganga sum frægast*

## Ovurkátir studentar órógvaðu ferðsluna

Í orrustuni um næmingin í Hoydølum, sum varð burturvístur, tí hon parkeraði soleiðis, sum tað ikki hóvaði leiðslu skúlans, mælti Marjus Dam studentaskúlanæmingunum til uppreistur.

– Tá eg gekk í Hoydølum fyri eini 30-40 árum síðani høvdu næmingarnir ikki funnið seg í slíkum, segði Marjus Dam við greiðari tilsiping til tiltikna uppreistrarsinnaða ungdómin Hoydølum serliga í sekstiog sjeytiárunum.

Og rætt hevur hann í tí, at studentaskúlanæmingar ikki eru serliga nógv frammi í samfelagskjaki nú á døgum. Men hvørja ferð síðsti skúladagur er hjá 3. g'arum, so fara tey á barrikadurnar. Soleiðis var eisini í morgun, tá tey við blómum, øli og karamellum stuttleikaðu sær við at órógva sera tøttu ferðsluna á Hvítanesvegnum.

Løgreglan var á staðnum og royndi sum frægast at flyta kátu, troyttu og fullu studentaskúlanæmingarnar.

Onkur helt fyri, at kanska átti leiðsla skúlans at fingið við í reglugerðina, at næmingarnir skulu hava sømiligan atburð – og virða landsins lógir og umdømi skúlans, so góðvarin avbygdarfólk – og hoyvíkingar, ótarnað sleppa til arbeiðis...

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*